# London 7/7 – eitt ár eftir

**Í dag er eitt ár síðan bumbuatsóknirnar í London. Í dag hevur minningarhald verið fyri teimum 52, ið mistu lívið hendan dagin fyri einum ári síðan**

YVIRGANGUR
*Johan Jacobsen*
*Johan@sosialurin.fo*

Kl. 8.50 í morgun ringdu kirkjuklokkurnar á St. Paul´s Dómkirkju fyri teimum, ið mistu lívið 7/7 2005. Hetta var júst løtan, tá ið tann fyrsti bumbubresturin av fýra hoyrdist hendan myrka hósmorgunin í bretska høvuðsstaðnum. Á middegi í dag varð lýst fyri tveimum minuttum í tøgn yvir alt landið, eisini í stóru Wimbledon tenniskappingini, sum fleiri eygu kring allan heimin fylgja við í. Eftir hetta var gudstænasta í St. Pancras Church við Euston Road, har fleiri trúargreinar luttóku.

### Bretar minnast

Bretska tjóðin minnist ræðuliga dagin fyri einum ári síðan, tá ið fýra bumbumenn á ymiskum støðum, har nógv fólk var savnað, sprongdu seg í luftina og tóku tilsamans 52 onnur við sær í deyðan. Fólk í hundraðtali komu til skaðis av spreingingunum.

Dagurin hevur uttan iva sett seg í minnið á teimum flestu. Fjølmiðlarnir hava gjørt nógv burturúr degnum og eisini hava teir seku handan atsóknirnar gjørt vart við seg. Ígjár vórðu sjónbandupptøkur av tí eina bumbumanninum sendar á arabisku rásini Al-Jazeera. Hetta hevur sjálvsagt lagt ein enn myrkari dám á minningardagin.

### Ein annar komandi 7/7?

Bretar hava sett sær spurningin um teir eru til reiðar til eina aðra bumbuatsókn. Eftir yvirgangsatsóknirnar 11. september í 2001 hava myndugleikar í bretska høvuðsstaðnum fyrireikað seg til eina tílíka atsókn. Og tað gekk væl við at koma út á gerningsstøðini og við hjálp. Fleiri hundrað hjálparfólk hava fingið virðisløn fyri teirra avrik hendan dagin. Men hendan umfatandi atsóknin, við fýra álopum á ymiskum støðum og trý av teimum samstundis, var ein stór avbjóðing hjá hjálparfólkum. Hetta gjørdi tað trupult at samskifta og skipa hjálparararbeiðið. M.a. gramdi ambulansatænastan seg um, at tey vóru ov bundin av fartelefon-samskifti. Slíkt samskifti varð ómøguligt hendan dagin, orsakað av yvirkapasiteti. London Ambulance Service viðgjørdu og fluttu meiri enn 400 sjúklingar eftir bert trimum tímum.

### Boð frá bumbumonnunum

Dagin fyri minningardagin sendi al-Jazeera rásin myndir av tí eina bumbumanninum, sum eisini doyði. Á bandinum ákærir bumbumaðurin bretsku veljararnar fyri at hava atkvøtt fyri sitandi stjórnini. Bumbumaðurin sigur, at fleiri líknandi atsóknir eru í væntu, um ikki herdeildirnar í Afganistan og Irak verða tiknar aftur. Bandið er tikið upp, áðrenn hann fór umborð á tokið í undirgrundini í London, við Circle Line støðina. Við honum doyðu seks onnur. Somuleiðis er eitt brot á sama bandi við næstovastanum í al-Qaeda, Ayman al-Zawahiri, sum rósar bumbumanninum Tanweer fyri hansara avrik og fyri hansara lívsførslu annars. Hetta var eisini sent á al-Jazeera.



*Stórbýurin var lammaður hendan dagin, tá ið hann var raktur av yvirgangsatsóknum*

## Ann og Sámal Christiansen minnast afturá



– Vit komu til ta einu tokstøðina, umleið ein kilometur frá tí eina rakta staðnum. Men har var alt avbyrgt. Klokkan var umleið 09.30. Vit skuldu við flogfarinum beinleiðis til Føroya úr Stansted tann morgunin. Fyrst skuldu vit avheinta eina mynd, annars var ætlanini at fara fyri við tokinum í undirgrundini. Um vit høvdu gjørt tað, so veit ein ikki, hvat hevði kunnað hent, sigur Ann Christiansen, ið dagliga starvast á skrivstovuni á Sosialinum.

Hon og maðurin Sámal vóru á veg út á Stansted flogvøllin, men tá ið atsóknirnar raktu, steðgaði alt upp. Øll ferðsla í umráðnum – bussar, tok, hýruvognar – steðgaði upp, og hóast tey bæði royndu at ringja og fáa samband við familju har heima, so var tað ómøguligt at koma ígjøgnum. Stórbýurin var so at siga lammaður.

- Vit stóðu har við kuffertum og vistu ikki, hvat vit skuldu gera. Ongan hýruvogn fingu vit teir fyrstu tímarnar. Ikki fyrr enn seinnapartin einaferð fingu vit ein hýruvogn, men út á Stansted flogvøll sluppu vit ikki, tí tá skuldu vit ígjøgnum alt tað avbyrgda umráðið. So vit vórðu koyrd út á Heathrow flogvøll, greiðir Sámal frá.

Tá eg práti við Ann minnist hon ikki heilt, hvør dagurin er í dag. – Er tað longu eitt ár síðani, sigur Ann.

Soleiðis mann tað uttan iva vera hjá fleiri, mangt hendir jú í einum ári. Brádliga, so er eitt ár liðið og síðan kemur hendingin týðuliga fram aftur. Men endamálið og meining við yvirganginum er ringt at fáa eyga á. Ann sigur frá, at fólk á gøtuni í London hendan morgunin, beinanvegin nevndu al-Qaeda, sum gerningsmenn.

# Hergeir Nielsen minnist afturá

Tá eg dagin fyri minningardagin spyrji Hergeir Nielsen, løgtingsmann, um hann minnist dagin 7. juli. Hann er skjótur at svara.

– Jú, tað er dagurin, sum seint fer í gloymibókina – í morgin er eitt ára dagurin eftir bumbuatsóknirnar í London.

Hann var staddur nærhendis ta einu undirgrundarstøðina, har ein bumba brast. Hann greiðir frá, at ein slík ræðulig uppliving fer seint úr minninum. Hann og konan komu úr Isle of Man hendan morgunin og skuldu út at síggja London-bý. Tey búðu á einum gistingarhúsi í býarpartinum Kings Cross, har tann eina bumban brast, nærhendis undirgrundarstøðini.

Tað var ætlanin, at tey bæði skuldu við toki í undirgrundini umleið hesa somu løtuna. Men konan bleiv eitt sindur illa fyri, so tey útsettu túrin eitt sindur. Hergeir Nielsen var hendan morgunin í ferð við at keypa nakað av frukt, tá ið hann sá, at fjáltur líkasum kom á fólk og tey byrjaðu at renna í ymsar ættir. Stutt eftir hetta, varð økið avbyrgt og tey bæði vóru víst inn á gistingarhúsið.

– Tað sá ræðuligt út. Fólk runnu grátandi aftur og fram á gøtuni. Tá visti eg, at okkurt var heilt galið. Vit hoyrdu jú ongan bumbubrest, tí spreingingin var 30 metrar undir jørð.

Fjølmiðlarnir vóru skjótir á staðnum, og fólk og bilar frá CNN, BBC og øðrum stillaðu upp á gongubreytini.

– Vit sótu inni á gistingarhúsinum og sóu hesar ræðulig myndirnar. Vit sóu einki til ofrini ella tey sáraðu, tí økið bleiv beinanvegin avbyrgt.

### Í bussi dagin eftir

Hergeir Nielsen sigur eisini frá, hvussu tað kendist dagin eftir at brúka almenna ferðslukervið í býnum. - Vit koyrdu í bussi dagin eftir, tá ið vit sóu ein myrkan mann seta eina tasku frá sær og fara longur fram í bussin. Tá hugsaðu vit jú okkara, skuldu vit fara út ella hvat? Men einki hendi. Hetta man vera ein partur av tí, at ferðast í almenna ferðslukervinum nú á døgum í stórbýnum. Tá ið tey skuldu flúgva heim, skuldu tey út á flogvøllin, sum liggur nakað væl uttanfyri London.

– Vit vóru líkasum noydd at fara í tokið, tí vit skuldu út á flogvøllin í Stansted, sum liggur eitt sindur uttanfyri býin. Vit fingu at vita, at tað ómøguliga kundi henda aftur, eftir sum at trygdin nú av álvara var í hásæti. So vit fóru.

– Men eg fari at minnist hendan dagin. Tað er so, tá ið nakað líknandi hendir. Ein minnist, hvar mann sjálvur var, tá ið ein stórhending fór fram. Men, tá ið ein sjálvur var staddur so nær eini tílíkari hending sum hesari, tá kennist tað serliga sterkt. Eg prátaði eisini við eldri London-búgvar, sum søgdu seg hugsa um hendingarnar frá 2. Veraldarbardaga.




*– Eg prátaði eisini við eldri London-búgvar, sum søgdu at hetta minti teir á hendingar frá 2. Veraldarbardaga*